# **Kreativur** búskapur í Føroyum



**Verkstova um kreativar vinnur og skipan av mentanarøkinum við Tom Fleming, bretskum serfrøðingi, í Norðurlanda-húsinum 16. og 17. juni 2009.**

**TÍÐINDASKRIV**

Rógvi Nybo
rogvi@sosialurin.fo

Verkstovan fer at viðgera ta virðisøking, ið fer fram á kreativa og mentanarliga økinum og hvørja ávirkan hetta hevur á landsins búskap og samfelagið sum heild. Hugt verður nærri eftir, hvønn leiklut kreativi búskapur Føroya hevur í norðuratlantiskum, norðurlendskum og altjóða høpi.

**Verkstovan setur fokus á:**

- kreativan búskap, kreativar vinnur og mentanarskipan
- hvussu kreativar vinnur og mentanarøkið í Føroyum virka
- møguleikar og avbjóðingar fyri kreativar vinnur og mentanarøkið í Føroyum

Umboð fyri kreativu vinnuna, mentanarøkið, stovnar og politisku skipanina verða boðin til verkstovuna, sum verður í Norðurstovu í Norðurlandahúsinum, týsdagin 16. juni og mikudagin 17. juni, báðar dagarnar klokkan 9 til 16. Kunnað verður nærri um skránna seinni.

Talið av luttakarum er avmarkað og tí er bindandi tilmelding neyðug. Vinarliga boðið frá luttøku innan 8. juni á armgardw@mmr.fo ella unnp@mfa.fo

Verkstovan er skipað í samstarvi millum Vinnumálaráðið, Uttanríkisráðið, Mentamálaráðið og Norðurlandahúsið.

Tom Fleming er stjóri í Tom Fleming Consultancy og serfrøðingur í kreativum búskapi og mentanarskipan. Tom Fleming Consultancy ráðgeva, halda fyrilestrar og verkstovur um kreativan búskap og mentanarskipan kring allan heim.

Tom Fleming hevur fyri NICe, Nordic Innovation Centre, skrivað "A Creative Economy Green Paper for the Nordic Region", ið viðgerð kreativu vinnurnar í norðurlendsku londunum.







P/f Jógvan Weihe

Kakao-flis
50 l kr. 125,-
Tilboð verður givið fyri størri nøgdir

BIOLOGISK KAKAO-FLIS
www.kakao-flis.dk

Stiðjagøta 10 · Boks 1008
FO- 110 Tórshavn
Tel. 35 38 97 · www.weihe.fo




Sony myndatól
DSC-S950
Vanl. prísur 1.195,-
995,-
200,- spar



Tunt og lætt snið. 10,1 mega pixel og eitt objektiv við 4x optiskum zoom. Sera brúkaravinarligt og við 2,7" stórum skermi.

Sony upptøkutól
DCR-SX30
2.495,-
NÝTT



Sera einfalt upptøkutól við innbygdum minni á næstan 3 tímar. Tekur eisini uppá MemoryStick. 60x optiskt zoom og 2000x digitalt zoom.

Sony speglrefleks myndatól
DSLR-A200K
-Super SteadyShot
-2,7" LCD skíggi
-Antistøv- skipan
-við 18-70mm linsu
3.995,-
10,2 megapixels



HANDILIN
tel. 351220 - www.lm.fo - lm@lm.fo